## Friður um pólin

Tey fimm londini, sum hava mark ímóti Norðpólinum, eru á einum máli um, at tey skulu samráða seg fram til, hvussu stórum havøki hvørt teirra kann fáa ræði á. Tað stendur í niðurstøðuni frá fundi, sum umboð fyri Kanada, USA, Russland, Noreg og Danmark/Grønland hava hildið í kanadiska býnum Chelsea. Londini eru eisini samd um at herða trygdarkrøvini, nú støðugt fleiri skip sigla í tí arktiska økinum. Londini ásanna, at tað er neyðugt at verja umhvørvið og at tryggja upprunafólkinum í Arktis búskaparliga og sosiala menning.



## Nógvir húsagangir

Altjóða fíggjar- og búskaparkreppan noyðir støðugt fleiri og fleiri danskar fyritøkur at lata aftur. Bara hendan seinasta ársfjórðingin eru meiri enn 1.600 fyritøkur farnar av knóranum, og tað er tað mesta nakrantíð í einum ársfjórðingi, sigur DR. Sama ársfjórðing í fjør, sum var tað stóra kreppuárið, fóru 1.365 fyritøkur av knóranum. Ein greinari sigur við DR, at gjaldførið hjá nógvum donskum fyritøkum er svikaligt. Hann væntar tí, at nógvar av fyritøkunum fáa ilt við at útvega sær lán og kredittir, og tí væntar hann fleiri húsagangir afturat ta næstu tíðina.

# Løgreglan fylgir gongdini í Leirvík

**Løgreglan fylgir gjølliga við gongdini, nú býráðið í Eystur-kommunu hóttir við at steingja vegin í sambandi við Norðoyatunnilin**

NORÐOYATUNNILIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Løgreglan hevur eitt vakið eyga við, um býráðið í Eysturkommunu ger álvara av hóttanini um at steingja vegin í sambandi við Norðoyatunnilin.

Í fleiri ár hevur verið tosað um at gera nýggjan veg ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin, men hóast Løgtingið longu fyri fýra árum síðani samtykti at gera arbeiðið, er onki hent enn og sum støðan er nú, røkist heldur ikki fyri, at nakað hendir við tað fyrsta.

Og nú hevur býráðið mist tolið og hevur hótt við at steingja vegin, fæst ikki ein semja nú.

Í hesum sambandi verður fundur ímillum býráðið og Anniku Olsen, landsstýriskvinnu eftir páskir.

Og tað verður seinasti møguleikin at finna eina loysn, tí býráðið stendur fast við, at fæst ikki ein semja á tí fundinum, sum tey í býráðnum eru nøgd við, verður vegurin stongdur.

Hann verður ikki kvettur heilt av, men bummur verður settur fyri og so verður ferðslan leidd ígjøgnum ávísar klokkutíðir, sum kommunan ásetir.

### Bíða eftir úrslitinum

Í innlendismálaráðnum kundu hvørki Hilmar Høgenni, deildarstjóri við kommunumálum undir sær ella Rúni Joensen, aðalstjóri, siga við vissu, hvat fer at henda, skuldi tað hent, at býráðið í Eysturkommunu ger álvara av hóttanini um at steingja vegin ávísar tíðir á degnum.

Men mett verður, at hetta er meiri eitt mál fyri løgregluna at gera av, um tað er lógarbrot at steingja vegin.

Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, sigur, at Løgreglan hevur eygað við málinum.

- Vit hava verið í sambandi við býráðið í Eysturkommunu og fingið at vita, hvussu støðan er.

Hann sigur, at eisini løgreglan bíðar nú eftir úrslitinum av fundinum millum býráðið og politiska myndugleikan.

Býráðið hevur boðað frá, at tað verður avgerandi fyri, hvat hendir.

- Eftir tann fundin frætta vit aftur og so taka vit tað haðani frá, leggur Jón Klein Olsen afturat.

Heldur ikki hann dugir at siga akkurát, hvørji rættindi kommunan hevur at stongja vegin heilt ella partvís.

- Vit hava verið í samskifti við kommununa um gongdina og vit kanna málið, men vit eru ikki komin til nakra niðurstøðu enn, sigur hann.

Hann vísir kortini á, at í grein 28 í ferðslulógini stendur, at ein vegur kann ikki steingjast uttan víðari.

Nú er meiningin at seta avmarkaðan stongsul í verk, so at hann verður opin ávísar dagar og varapolitiinspektørurin dugir ikki enn at siga, um tað broytir støðuna nakað.



*Enn er løgreglan ikki komin til nakra niðurstøðu um hon fer at leggja uppí, ger býráðið í Eysturkommunu álvara av at stongja vegin í sambandi við Norðoyatunnilin*

# Vil hava fleiri sparingar

- Eg taki fult undir við, at tað fleiri almennar sparingar verða settar í verk.

Tað sigur Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður og formaður í fíggjarnevndini.

Í morgun legði Jóannes Eidesgaard uppskot um fíggjarkarmin næstu árini fyri Løgtingið og tá ið tað hevur verið til viðgerðar í tinginum, verður tað lagt í fíggjarnevndina til víðari viðgerð.

Sum formaður í nevndini fær Anfinn Kallsberg sítt stóra orð at siga í teirri viðgerðini.

Men hann vil ikki gera tær stóru viðmerkingarnar enn.

- Eg fái onki sagt, fyrrenn tingið hevur viðgjørt málið og tað er komið í fíggjarnevndina, tí tað er ikki fyrrenn tá, at eg fái at vita, hvørjar tankar hinir nevndarlimirnir gera sær, sigur hann.

Hinvegin dylir Anfinn Kallsberg, at hann tekur fult undir við Fólkaflokkinum í hesum málið.

Og Fólkaflokkurin krevur, at skulu avgjøld leggjast á borgarar og vinnulív, skal tað almenna eisini spara meiri enn tað er lagt upp til í uppskotinum, sum varð lagt fyri tingið í morgun.

- Eg eri ein partur av uppskotinum hjá Fólkaflokkinum og eg fari sjálvandi at gera mítt til at fáa meiriluta fyri so nógvum av teimum sjónamiðjunum, sum gjørligt, sigur Anfinn Kallsberg.



*Formaðurin í fíggjarnevndini, Anfinn Kallsberg, fer at royna at finna semju um uppskotið hjá Fólkaflokkinum um fleiri almennar sparingar*

*Uttan loyvi frá politivaldi má ongin lutur leggjast ella setast á veg, sum kann vera ferðsluni til bága, uttan so, at serstøk viðurskiftir gera tað neyðugt*

***Ferðslulógin, grein 28***